# Partabrøv til sølu

Partabrøv í P/F nr. 3, Tjaldur, til sølu

**Tlf. 217300**

## Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 130 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðuroki, Miðøki og Suðurøki halda til í ávikavíst Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Miðøki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 52 starvsfólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

### Eftirlitsfólk

**Søkt verður eftir eftirlitsfólkum til Toll- og Skattstovu Føroya, Miðøki, til at byrja 1. mai ella skjótast til ber.**

**Vit vanta at tú**
hevur eina útbúgving frá hægri lærustovni, so sum HA, HD, Cand. Merc. Aud. ella líknandi útbúgving innan rokniskap. Eisini vanta vit at tú ert arbeiðssamur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni. Viðkomandi arbeiðsroyndir hava eisini okkara áhuga.

**Uppgávurnar hjá eftirlitsfólkunum verða m.a:**
- at fremja eftirlit og grannskoðan av skatti, meirvirðisgjaldi og tolli
- at vitja fyritøkur
- at málsviðgera
- at gera váðametingar
- at ummæla kærumál og dómsmál

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert og fakligt mennandi starv við nógvum avbjóðingum. Góðir møguleikar eru eisini fyri eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Setanarøki**
Setanarøkið er Miðøki, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Umsóknir**
Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðun Joensen, deildarleiðara, ella til Vilhjálmur Gregoriussen, økisstjóra, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera Toll- og Skattstovu Føroya í hendi í seinasta lagi: 10. apríl. 2007.

*15. mars. 2007*

**Toll- og Skattstova Føroya**
Miðøki
Postsmoga 2151
FO-165 Argir







# Konditara lærlingur

**Hevur tú hug at útbúgva teg innan bakarayrkið, hava vit eitt læripláss leyst at søkja.**

**Bakaríið Grón hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt kondittarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.**

**Kondittaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram har tey hava, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri kondittarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.**

**Kondittaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving, til m.a. matvørutøkning.**

**Lærutíðin til kondittara er 3 ár og 7 mðr., harav 38 vikur eru á tekniskum skúla í Danmark.**

**Ætlanin er at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.**

**Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.**

Grón SÍÐAN 2006

**Bakaríið Grón**
**Hoyvíksvegur 65**
**Tlf. 23 62 11 ella 31 21 61**

# Kunngerð

**Serstaka byggisamtykt nr. 1 í Hvalbiar kommunu.**

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Hvalbiar bygdaráð á fundi 10. oktober 2006 samtykti broyting í byggisamtyktini fyri Hvalba.

Ætlaða broytingin er, eitt øki uppá 22.231 $m^2$ sum liggur millum Sandaveg og Nýggjaveg í Hvalba og verður broytt frá H øki sum er frílendi til E øki sum er almennir stovnar.

Broytingin umfatar matr. nr. 51f, 98a, 29h, 212a, 332, Hvalba.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina liggur frammi á kommunuskrivstovuni – gamli skúli, vestara stova í Hvalba – frá 26. mars til og við 23. apríl 2007, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 14.00 til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Hvalbiar kommunu skrivliga í seinasta lagi 26. juni 2007.

***Hvalbiar kommuna***

# ÓLAVSØKUFRAMSÝNINGIN 2007

Við hesum verður heitt á listafólk millum 18 og 30 ár at senda verk inn til framsýningina. Verkini skulu vera inni á Listasavninum í seinasta lagi leygardagin **14. juli kl. 12.00**

Spurningar o.a. skulu sendast til :
**unglist@gmail.com**

Verkini skulu sendast til:

**Ólavsøkuframsýningin**
**Listasavnið**
**Gundadalsvegur 9**
**P.O. Box 1141**
**FO-110 Tórshavn**

**Sí treytir og upplýsingar á: www.art.fo/fo**
**ella á www.myspace.com/unglist**

Ólavsøkuframsýningin · Gundadalsvegur 9 · Tórshavn · www.art.fo · Tel +298 259144 · unglist@gmail.fo